UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 6. juni 2023
J. nr.: 23/11821
Tygara skriv: 52-107/2022

Løgtingið

Svar upp á § 52 a fyrispurning nr. 52-107/2022 frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, um fiskavirkisskipanina

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu nógv er útgoldið úr fiskavirkisskipanini seinastu 10 árini?
2. Hvussu stórur partur av hesum er útgoldið til starvsfólk á virkjum í ali- og uppsjóvarvinnuni?
3. Í samgonguskjalinum stendur, at fiskavirkisskipanin skal eftirmetast. Hvussu langt er landsstýrismaðurin komin við hesum arbeiði?

Nr. 1

Samlaða útgjaldið úr fiskavirkisskipanini seinastu 10 árini er á leið 239.669.000 krónur. Sí talvuna niðanfyri.

Útgjald:	229.316.711 kr.
Eftirløn:	5.758.837 kr.
Almenn gjøld:	4.593.191 kr.

Ár	Vanliga skipan (tkr)	FV-skipanin (tkr)	Eftirløn - vanlig skipan (tkr)	Eftirløn FV-skipan (tkr)	Almenn gjøld (tkr)	Íalt (tkr)	FV í % av samlaðu útgjøldunum
2012	199.592	20.806	-	-	4.320	224.718	9%
2013	151.746	24.405	-	-	3.430	179.581	14%
2014	120.790	22.553	-	-	2.927	146.270	15%
2015	92.184	24.296	-	-	2.310	118.790	20%
2016	71.458	20.191	-	-	1.894	93.542	22%
2017	57.077	15.414	-	-	1.534	74.025	21%
2018	45.497	17.049	-	-	1.303	63.849	27%
2019	30.476	14.520	1.549	755	887	48.188	30%
2020	47.116	20.115	3.041	1.298	1.377	72.947	28%
2021	43.542	24.360	3.056	1.710	1.337	74.005	33%
2022	28.752	25.607	2.241	1.996	1.067	59.662	43%
	888.230	**229.317**	**9.887**	**5.759**	**22.384**	**1.155.576**	

Nr. 2
Samlaða útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli úr fiskavirkisskipanini til starvsfólk á ali- og uppsjóvarvirkjum árini 2012 – 2022 er umleið 120.389.000 krónur. Eftirløn og almenn gjøld eru ikki við í upphæddini.

Útgjøldini í 2023 á stívliga 9,0 mió. krónur eru ikki við í hesi upphæddini.

Um borið verður saman við samlaðu upphæddina hesi árini – uttan eftirløn og almenn gjøld – so eru á leið 53% av samlaðu útgjøldunum úr fiskavirkisskipanini goldin starvsfólkum á ali- og uppsjóvarvirkjum.

Virki:	**2012 (tkr.)**	**2013 (tkr.)**	**2014 (tkr.)**	**2015 (tkr.)**	**2016 (tkr.)**	**2017 (tkr.)**	**2018 (tkr.)**	**2019 (tkr.)**	**2020 (tkr.)**	**2021 (tkr.)**	**2022 (tkr.)**	**2023 (tkr.)**	**Íalt (tkr.)**
P/F BAKKAFROST HARVEST	552	887	700	334	344	13							**2.829**
P/F BAKKAFROST PROCESSING	389	436	1.198	2.615	2.689	1.885	3.341	447	1.303	4.160	3.002	4.648	**26.115**
P/F FAROE FARMING	1.478	926	611	620	71	769							**4.475**
P/F HAVSBRÚN	687	257	216	241	359	298	422	382	341	738	430		**4.371**
P/F LUNA	505	214	572	1.492	486	875	591	499	650	623	2.320	62	**8.889**
P/F MOWI FAROES								924	781	708	1.001	279	**3.694**
P/F P.P. FAROE PELAGIC	2.475	3.041	3.660	3.511	3.034	2.307	3.299	2.045	2.400	863	2.164	1.005	**29.803**
P/F PELAGOS			68	1.888	1.407	795	651	918	1.348	735	1.406	436	**9.654**
P/F SNARFROST									294	278	48	20	**640**
P/F VARÐIN PELAGIC	758	3.535	4.548	3.892	2.863	1.988	4	2.833	2.441	3.670	3.159	2.087	**31.777**
P/F VESTMANNA SEAFOOD				655	996	477	728	776	1.183	604	1.260	497	**7.176**
Íalt	**6.845**	**9.294**	**11.572**	**15.247**	**12.248**	**9.406**	**9.039**	**8.825**	**10.741**	**12.379**	**14.791**	**9.034**	**129.423**

Nr. 3
Tá føroyska arbeiðsloysisskipan varð sett á stovn í 1992 skuldi skipanin vera ein fulltíðararbeiðsloysisskipan, har fólk fingu arbeiðsloysisstuðul í (helst) styttri tíðarskeið, meðan tey vóru arbeiðsleys.

Hesi seinastu 10 árini ella so er útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli úr fiskavirkisskipanini vorðið alsamt vaksandi partur av samlaða útgjaldinum hjá ALS, og harvið er skipanin í vaksandi mun vorðin ein ískoytisarbeiðsloysisskipan heldur enn ein fulltíðararbeiðsloysisskipan, og nærum helmingurin av samlaða útgjaldinum er nú arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini.

Stýrið fyri ALS, sum er sett saman av umboðum fyri arbeiðsmarknaðin, hevur gjørt eina eftirmeting av fiskavirkisskipanini og hevur mælt til at gera nakrar broytingar í kunngerðini um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum. Umhvørvismálaráðið hevur sent uppskot til broytingar í kunngerðini til hoyringar. Hoyringarfreistin er 14. juni 2023.

Uppskotið hevur við sær, at arbeiðsleys á fiskavirkjum skjótari kunnu koma í vanligu arbeiðsloysisskipanina og harvið fáa hægri útgjald og verða tøk til onnur størv. Ítøkiliga er talan um at áseta krav um, at í fýra vikur á rað skal persónur hava í minsta lagi 16 arbeiðstímar á tí fiskavirkinum, viðkomandi hevur tilknýti til. Annars verður viðkomandi ikki mettur sum arbeiðsleysur á fiskavirkinum og fær ikki longur arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini. Sum nú er, ber til at vera í og fáa útgjald úr fiskavirkisskipanini, um onki arbeiði er á fiskavirkinum, í upp til átta vikur. Um persónur fer til arbeiðis í ein tíma ella tveir í til dømis sjeyndu ella áttandu vikuni, verður tíðarskeiðið longt við átta vikum afturat. Fólk kunnu sostatt vera arbeiðsleys og hava rætt til arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini í langa tíð.

Broytingarnar hava harumframt við sær, at tað skulu ganga minst fýra vikur, frá tí at ein persónur er dottin úr fiskavirkisskipanini, til viðkomandi kann sleppa í fiskavirkisskipanina aftur. Dettur ein persónur úr fiskavirkisskipanini, tí viðkomandi ikki lýkur treytirnar um minst 16 arbeiðstímar í fýra vikur á rað, kann viðkomandi fara í vanligu arbeiðsloysisskipanina og/ella søkja um at koma í fiskavirkisskipanina aftur, tá ið fýra vikur eru gingnar. Fer persónurin í vanligu arbeiðsloysisskipanina, ber tað væl til hjá viðkomandi at fara til arbeiðis aftur á sama fiskavirkinum, samstundis sum viðkomandi er í vanligu arbeiðsloysisskipanini. Kunngerðin um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli ásetur, hvussu nógv kann verða arbeitt, samstundis sum viðkomandi fær lutvíst útgjald úr ALS.

Samanumtikið fara broytingarnar at hava við sær, at fólk koma skjótari inn í vanligu arbeiðsloysisskipanina, har útgjaldið er hægri enn í fiskavirkisskipanini, og harvið verða skjótari tøk at taka á seg annað arbeiði.

Semja er ikki í stýrinum fyri ALS um, hvørt ali- og uppisjóvarvirkir framhaldandi skulu vera partur av fiskavirkisskipanini, og tískil er einki tilmæli komið til landsstýriskvinnuna um at gera broytingar hesum viðvíkjandi.

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna